# Skapanarsøga úr norrønu gudalæruni

Í fyrstuni var alt eitt tómt rúm, Ginnungagap. Her møttust kuldin norðaneftir og hitin sunnaneftir, og tað varð mjørki. Køldumegin lá Nivlheimur og heitumegin Múspellheimur.

Av tí at neistar fuku úr Múspellheimi, tiðnaði ísurin í Nivlheimi, og tað fór at dryppa. Droparnir fullu í Ginnungagap og tóku skap. Fyrsta skapið var frumjøtunin Ymir og eitt annað skap var kúgvin Eyðhumla.

Ymir drakk mjólk undan kúnni og lá og sveittaði. Undan hondini vinstrumegin vuksu ein maður og ein kvinna, og vinstri fótur fekk ein son við høgra fóti. Frá hesum soni eru allir jatnir.

Eyðhumla sleikti nøkrum søltum steinum, og fram kom ein maður. Hann æt Búri og er ættfaðir at æsagudunum Óðini, Vilja og Ve.

Æsirnir drupu Ymir, og úr likami hansara varð heimurin skaptur. Blóðið varð til hav, áir og vøtn, beinini til fjøll, holdið varð til jørð, tenninar til klettar og hárið varð til skóg. Skallin varð til himmalhválvið, og tankarnir til skýggj. Neistarnir úr Múspellheimi vórðu til stjørnur, og úr eygnabrúnum á Ymi skaptu æsirnir eina girðing, sum skal verja mannaheimin og gudaheimin móti ónda jatnaríkinum.

Mannaheimurin eitur Miðgarður og jatnaríkið Jøtunheimur.

Størsta træ í heiminum var ein risaaskur, Yggdrasil. Bulurin rakk heilt til himmals, og greinarnar breiddu seg um allan heimin. Yggdrasil hevði tríggjar røtur. Ein vaks inn undir Ásgarð, har æsirnir búðu, haðani kom keldan Urðarbrunnur, sum ráddi yvir fortíðini.

Onnur rótin vaks inn undir Jøtunheimin, har jatnirnir búðu, og haðan kom keldan Mimisbrunnur, sum var fullur av vísdómi.

Triðja rótin vaks inn yvir deyðsríkið Hel í Nivlheimi, til ta kelduna, haðan vatnið ella ísurin kom, tá heimurin varð skaptur. Til Hel fóru tey, ið doyðu av sjúku og elli. Tey, ið doyðu í bardaga, fóru til Valhøll í Ásgarði.

Ein onnur norrøn skapanarsøga sigur, at ein dagin æsirnir Óðin, Vilji og Ve gingu í fjøruni, funnu teir eina klótu, og úr henni skaptu teir ein mann og eina kvinnu. Óðin gav teimum ond og lív, Vilji gav teimum skil og heilsu, og Ve gav teimum allar sansir. Æsirnir góvu teimum nøvnini Askur og Embla, og frá teimum báðum eru menniskjuni ættað.

**Visti tú**

at eftir at fólk við siðbundnum átrúnað eru kristnað, halda tey ofta fram at gera ymiskt, sum hoyrdi fyrra átrúnaðinum til, serliga sovorðið, sum vardi tey ímóti óndum maktum. Hetta er eisini galdandi fyri summar av prestum teirra.



? girðing · klótu

*Kúgvin Eyðhumla sleikir Búra úr steinunum og fýra mjólkaáir flóta úr júgrunum.*

# Norrøn gudalæra

**FAKTA**

Í staðarnøvnum, máli, skaldskapi og hugsanarhátti finna vit leivdir av gomlum átrúnaði.

- Sigmundargøta
- Óðinshædd
- Ægishædd
- Geytagøta
- Tróndargøta
- Tórðargøta

*Perma frá 18. øld til Snorra Eddu.*

Tað er ilt at siga við vissu, hvussu gamla gudatrúgvin hevur verið her á landi, tí vit hava ongar skrivligar keldur hesum viðvíkjandi. Vit vita tó, at íslendingar hava í varðveitslu frásagnir um hin forna átrúnaðin. Hesar frásagnir vórðu í 1100-talinum skrivaðar á skinn, ið vórðu evnað til hetta endamál. Mesta kunnleika um gomlu gudalæruna fáa vit úr gudakvæðunum Vøluspá og Hávamál, ið finnast í tekstum, nevndir Eldra Eddan. Vølvuspá er um framtíð jarðarinnar. Hávamál er um átrúnaðin í Norðurlondum í fornøld.

Seinni gjørdi Snorri Sturlason, ið doyði í árinum 1241, eina nágreiniliga lýsing av norrønu gudalæruni burtur úr hesum kvæðum. Tekstirnir hjá honum verða nevndir Yngra Edda. Tá ið íslendingar um hetta mundið ferðaðust nógv til hini Norðurlondini, er heldur ikki óhugsandi, at hesin forni átrúnaður hevur verið kendur í øllum Norðurlondum.

Ein onnur áhugaverd kelda er frásøgn frá einum muslimskum sendimanni nevndur Achmad Ibn Fadlan, ið var á ferð í Norðurlondum í árinum 922.

## Arábin Ibn Fadlan

Arábin Ibn Fadlan var við í eini sendinevnd, sum um summarið 922 við ánna Volga í Russlandi hitti eitt fólkaslag, ið helst hevur verið víkingar á handilsferð. Í ferðafrásøgn síni greiðir hann frá gudsdyrkan og siðum hjá hesum fólkaslagi.

*Tá ið skipini hava lagt at, fer hvør maður í land og hevur við sær breyð, kjøt, leyk, mjólk og nabidh, ein fruktdrykk, og stendur við ein høgan viðarbul, sum er reistur upp eftir enda. Ovast á honum er eitt andlit sum á einum menniskja. Rundan um henda bulin eru smáar myndir. Aftan fyri hesar myndir eru langir plankar stungnir niður í jørðina. Hann steðgar framman fyri tí stóru myndini, kastar seg niður á jørðina og sigur: "O, Harri, eg komi av longum leiðum. Eg havi við mær hesa og hasa trælkonu, hetta og hatta skinn," til hann hevur ramsað upp allar sínar handilsvørur. So sigur hann:"Eg eri komin higar við hesum gávum," og leggur so teir lutir, hann hevði við sær, framman fyri myndina. At enda sigur hann:"Eg vil, at tú sendir mær ein keypmann við mongum dinarum og dirharum, sum keypir fyri mín prís – uttan um trætnað."*

*So gongur hann burtur haðan. Hjálpir hetta ikki, kemur hann aftur við gávum til tær smáu myndirnar at fáa tær at biðja fyri sær.*



? viðarbul · trætnað

## Ásatrúgv

Ásatrúgvin var trúgvin hjá norðbúgvum í fornøld og víkingaøld, henda ásatrúgvin verður eisini nevnd norrøna gudalæran.

At norrøna gudalærarn hevur havt fótafesti her í oyggjunum kemur fram í Føroyingasøgu. Har hoyra vit, at norski kongurin sendi Sigmund til Føroya at kristna føroyingar. Tann kendasti er Tróndur í Gøtu, sum meira ella minni varð noyddur at taka við kristnari trúgv.

Ásatrúgvin doyði mest sum út, tá kristindómurin kom í staðin. Sagnir eru um, at ávísar bygdir hava verið verandi heidnar langt upp í miðøld. Á okkara døgum eru fólk, ið hava tikið henda átrúnað til sín. Nøkur hundrað fólk við hesum átrúnaði eru skrásett í Norðurlondum í dag. Annars eru eisini fólk við hesum átrúnaði eitt nú í Onglandi og í USA.

Fólk við ásatrúgv eru tey, ið trúgva upp á gudar, nevndir eru æsir. Æsir liva í Ásgarði, meðan menniskju liva í Miðgarði. Í Útgarði liva jatnir, sum vilja ásum til lívs. Millum Ásgarð og Miðgarð er brúgvin Bivrøst, ælabogin, har ásin Heimdalur situr á varðhaldi. Tá jatnir koma eftir Bivrøst, skal Heimdalur blása í Gjallarhornið. Hetta er byrjanin til Ragnarøk, heimsins undirgang.

**FAKTA**

Bivrøst er brúgvin millum Ásgarð og Miðgarð. Hon er skapað og litt sum ælabogin. Heimdalur heldur vakt við brúnna Bivrøst og blæsir í Gjallarhornið, ið er ein langur lúður. Hann sær líka væl á nátt sum á degi, hann hoyrir grasið grógva, og ullina á seyði vaksa.

*Havgríms grøv í Hovi. Fremst í myndini grøvin hjá hestinum hjá Havgrími.*

## Bygdin Hov

Hov er gomul bygd og er umrødd í Føroyingasøgu. Har búði høvdingurin Havgrímur, og har hevði hann hov til sína gudsdyrkan. Av hesum hevur bygdin fingið navn. Hov var ein av høvuðsbygdinum í Føroyum í víkingaøld, og søgnin sigur, at stutt eftir, at Føroyar vórðu kristnaðar, varð kirkja bygd í Hovi.

# Yggdrasil

*Nornurnar og træið, 2003, eftir Anker Eli Petersen, f. 1959*

Í norrønu gudalæruni var Yggdrasil, eisini kent sum lívsins træ, eitt ógvuliga stórt heilagt askitræ, ið góðar og illar maktir bardust um. Hetta træ fevndi allan heimin og helt honum saman. Krúnan var altíð grøn og rakk upp ímóti himlinum, og tær tríggjar røturnar á trænum endaðu í trimum ymiskum heimum, Jøtumheimi, Helheimi og hin triðja undir Miðgarði.

Við fótin á trænum vóru keldurnar Mimisbrunnur, Urðarbrunnur og Hvergelmir. Í Mimisbrunni fjaldi allur vísdómur seg. Í hesum brunni lá eisini eygað á Óðini, ið hann var noyddir at ofra fyri vísdóm sín.

Við Urðarbrunn var tingstaður gudanna, har búðu eisini tær tríggjar nornurnar, Urð, Verðandi og Skuld. Tær tríggjar avgjørdu lívið hjá menniskjum, um tað skuldi verða stutt ella langt. Tá lívið skuldi enda, klipti ein teirra lívstráðin av. Í Urðarbrunni lá øll vitan um tað, ið hent var, og um tað, ið fór at henda. Tveir fuglar hildu til í brunninum, teir itu svanir, og frá teimum eru komin øll fuglasløg, ið soleiðis verða nevnd.

Í Hvergelmi var Niðhøggur, ormurin mikli, sum í heilum gnagaði rótina á Yggdrasil.

Í greinum træsins búði ein vitug ørn, og millum eyguni á ørnini sat ein heykur, Veðurfølnir. Ratatoskur var ein íkorni, ið rann upp og niður í trænum og bar øvundarorð millum Niðhøgg og ørnina.

Træið var fyri hørðum ágangi. Ormarnir í Hvergelmi gnagaðu av tí, og millum greinarnar gingu fýra hjørtir og ótu av leyvinum. Men tær tríggjar nornurnar, ið hildu til við træsins fót, oystu hvønn morgun vatn úr Urðarbrunni á træið, so tað ikki skuldi følna. So heilagt var hetta vatn, at allir lutir, ið komu í tað, gjørdust hvítir, sum hinnan undir eggjaskali.


Ásgarður
Miðgarður
Helheimur

*Nornurnar, 2006, eftir Edward Fuglø, f. 1965*

## Forni átrúnaðurin

Fólk hildu, at lív teirra varð stýrt av gudum, náttúruni, trøllum og øðrum óndum maktum. Fyri at yvirliva og kenna seg trygg var tað tí av alstórum týdningi at halda seg væl við hesar maktir.

Vanligur hugsanarháttur var, at lagna menniskjans var løgd, og lagnuna kanst tú sum so einki gera við. Nornurnar, Urð, Verðandi og Skuld, ráddu fyri mannalagnum. Tær spunnu lagnutráðin.

*Nornan, hon spinnur vár lagnutráð*
*bæði við liðum og hóllum á,*
*fáur fær tráðin heilt slættan,*
*ein táttur er silvur, ein annar er gull,*
*tann triði ein tárakelda so full,*
*tó spinnur hon tráðin rættan,*

*tí hann, ið gav okkum lív og ond,*
*heldur í spunalag, heldur um hond,*
*so hansara leið vit finna.*

*Johanna Maria Skylv Hansen*

Roynt kundi verða at blíðka tær maktir, ið høvdu ræðið, við at ofra. Hetta varð nevnt at blóta og varð gjørt nakrar ferðir um árið.

Fyri at verja seg móti trøllum og øðrum óndum maktum var neyðugt at kenna til ymisk snildi, so sum gátur og aðrar loynidómar, t.d. eru funnir rúnasteinar við áskriftum ella myndum, ið eftir fornari hugsan hevur verið hildið at verja móti illum andum.

### Visti tú

at *Urð* merkir tað, ið er hent. *Verðandi* merkir tað, ið hendir nú, og *Skuld* merkir tað, ið fer at henda.

at rúnir eru at finna á rúnasteinum og rúnakelvum í øllum tí norrøna mentanarheiminum, eisini í Føroyum. Rúnir vórðu hildnar at hava serstaka megi. Tað var ikki hvørs mans føri at rista rúnir. Tað var eitt serligt handverk. Fá dugdu at lesa rúnir, tí hildu fólk rúnasteinar og rúnakelvi vera duldarfull.

? hvørs mans føri · duldarfull

# Tróndur í Gøtu

Tróndur í Gøtu ætlaði at fáa Leiv, fosturson sín, giftan við Tóru Sigmundardóttir, sum átti mikið góðs.

Hon legði treytir við, at Leivur fyrst mátti fáa greiðu á, hvussu faðir hennara varð tikin av døgum.

*Sigldu teir til Suðuroyar*
*á tann sama dag,*
*Tróndur hevði sítt rúnakelvi,*
*ikki gloymdi hann tað.*

Tróndur fer til Sandvíkar og inn hjá Torgrími illa. Torgrímur letst einki at vita. Tó grunar Tróndur, at Torgrímur veit meir, enn hann letst. So roynir Tróndur gand. Hann letur kynda ein stóran eld í skálanum.

*Tróndur settist í sessin tann,*
*ið stóð millum eld og verkið,*
*manaði hann teir tríggjar upp,*
*tann gandakallur sterki.*

Teir tríggir vóru Einar suðringur, Tórur Beinisson og Sigmundur Brestisson, sum royndu at svimja Suðuroyarfjørð, tá teir flýddu undan Tróndi og hansara monnum. Einar og Tórur sjólótust, men Sigmundur vann upp land, har hann avmaktaður lá í taranum. Har funnu Torgrímur og synir hansara hann og gjørdu av við hann, so teir kundu fáa reyðargulsringin, hann bar um armin. Nú var gátan loyst, ringurin funnin, og Leivur fekk Tóru Sigmundardóttir til konu.

Líkið av Tóra, sum seinni rak á land, var grivið saman við líki Sigmundar í sandinum í Sandvík. Tey vóru seinni grivin upp aftur og jarðað í Skúvoy við kirkjuna, sum Sigmundur hevði latið bygt har.



## Rúnasteinur í Sandavágs kirkju

Frammi í kóri stendur rúnasteinurin, og á honum stendur skrivað: *"Torkil Onundarson Eystmaður av Rogalandi bygdi henda stað fyrst"*

Tað var í 1916, at tey funnu rúnirnar á steininum. Mikkjal á Ryggi varð boðsendur at týða rúnirnar. Hann týddi eftir besta førimuni og hevði einans misskilt okkurt orð, sum seinni varð rættað. Fyrr stóð steinurin uttan fyri kirkjuná, men harða veðurlagið í Føroyum fór ov illa við steininum og kámaði skriftina. Tí varð hann fluttur inn í kirkjuna.

## Ofring

Í byrjanini ofraðu ella blótaðu norðbúgvar ymsastaðni úti í náttúruni. Tey ofraðu virðislutir, ið vórðu grivnir niður ella hongdir upp og eldur settur á, so roykurin kundi náa gudunum.

Vórðu djór ofrað, hildu tey ofta eitt gildi, har nakað av kjøtinum varð etið. Á henda hátt hildu tey seg vera nærri gudunum.

Seinni fóru tey at byggja serstøk hús, har ofrað varð. Men eisini heima við hús varð hildið tætt samband við gudarnar. Umráðandi var at vísa teimum takksemi, tí tey hildu seg við hesum hava tryggari framtíðarvánir.

**FAKTA**

Í Christianskirkjuni í Klaksvík er ein ógvuliga forvitnisligur lutur. Tað er ein skírnarfuntur, doypifuntur, sum sigst at vera ein gomul offurskál, ið hevur staðið í einum heidnum gudahovi sum offurbolli. Hann er funnin í einum gomlum kirkjutoftum í Norðursjællandi. Danska tjóðsavnið læt kirkjuni hann sum gávu, tá hon varð vígd í 1963, og sigst hann vera eini 4000 ára gamal.

## Lívsins byrjan

Tá ið barn varð føtt, skuldi tað berast fram fyri pápan, ið avgjørdi, um barnið skuldi hava navn og liva, ella tað skuldi setast út at doyggja. Navngivið varð eftir ávísum siðum. Helst varð hildið, at tey deyðu kundu føðast av nýggjum, og tað hevur ávirkað navnavalið. Fyrst fødda dreingjabarn varð ofta uppkallað eftir abbanum í faðirætt.

## Familjan

At vera raskur og arbeiðssamur var stór dygd. Samanhaldið í familjuni var gott, og fólk settu æru í at verja síni. Varð onkur av teirra nærmastu álopin ella dripin, skuldi hetta hevnast. Av hesi orsøk var tað eisini við hvørt rætt og loyvt at drepa fyri at verja æruna.



? kámaði · gildi · framtíðarvánir

*Óðin og Sleipnir.*

## Óðin

Hægstur av gudunum í Ásgarði var Óðin. Hann var skapari menniskjans, krígsgudur og deyðsgudur. Harafturat var hann vísdómsgudur. Fyri at gerast vísdómsgudur mátti hann drekka av vísdómskelduni. Hetta læt seg bara gera við at geva Mimi, einum av jatnunum, annað eygað í pant. Óðin ráddi yvir eydnu og óeydnu manna. Av og á legði hann eisini upp í bardagar og gjørdi av, hvør vinna skuldi. Spjótið hjá Óðini kundi bæði fara ígjøgnum træ, stein og metal.

Tað var Óðin, sum saman við beiggjum sínum Vilja og Ve, skapti fyrstu menniskjuni. Ein dagin teir gingu niðri í fjøruni, funnu teir tvey træpetti, ið vóru rikin á land.

Teir umskapaðu træpettini til tvey menniskju, ein mann og eina kvinnu. Maðurin fekk navnið Askur og kvinnan Embla. Óðin blásti lívsanda í tey. Vilji gav teimum skil og rørslu og Ve gav teimum sansir og talu.



? pant

FAKTA

Ein gudinna æt Iðunn. Hon átti vakrar eskjur, har hon goymdi epli, sum høvdu merkiligan eginleika. Tá ið gudarnir eldust og gránaðu, fingu teir ein munnbita av eplunum, og gjørdust ungir aftur.

## Valhøll

Óðin búði í Valhøll. Har vóru 540 hurðar, og hvør teirra var so stór, at 800 mans kundu ganga skrúðgongu gjøgnum dyrnar lið um lið.

## Frigg

Kona Óðins æt Frigg. Frigg var ógvuliga sjálvbjargin og búði fyri seg sjálva í glæsiliga garðinum Fensalir.

## Hugin og Munin

Óðin hevði tveir ravnar. Hesir ravnar sótu á herðum hansara. Hvønn morgun flugu teir út at kanna, hvat hendi í heiminum. Síðani flugu teir heimaftur og lýddi honum í oyra, hvat teir høvdu sæð og hoyrt.

## Sleipnir

Hestur Óðins nevndist Sleipnir. Hann hevði átta bein og ferðaðist lættliga um land og hav og ígjøgnum loftið.

Tá ið stormur var, hildu fólk, at tað var Óðin, ið reið gjøgnum luftina á sínum áttabeinta hesti. Hann var á veg við deyðum krígsmonnum til Valhallar. Virðiligasti deyði, ið menn kundu fáa, var at doyggja á vali, á krígsvølli. Teir, ið doyðu í bardaga, vórðu av valkyrjunum førdir í Óðins høll, Valhøll, har teir sluppu at halda veitslu og stríðast hvønn dag til Ragnarøk, ið var heimsins endi.

Visti tú

at navnið á høvuðsstaði okkara, Tórshavn, er samansett av norrøna gudinum Tór og havn og hevur hamaran Mjølnir sum býarmerki.

## Tórur

Tórur var sonur Óðins. Mamma hansara æt Jørð, ið var ein av ásynjunum ella gudinnunum í Ásgarði. Hesar gudinnur ráddu fyri læknalistum, lyftum, kærleika og eiðum. Tórur var krígsgudur og sterkastur av øllum gudum og monnum. Tórur vardi menniskju ímóti jatnum og øðrum óndum maktum.

Tórur hevði ein hamara, ið nevndist Mjølnir. Við hesum hamara drap hann sjálvt tann størsta og sterkasta jøtunin. Altíð var hann sigurharri. Hann hevði ein vogn, sum tveir geitarbukkar drógu. Gjørdist hann svangur, drap hann báðar bukkarnar og át teir. Tórur ansaði væl eftir hvørjum einasta beini og legði tey aftur á bukkaskinnini. Tá ið hann var mettur, vakti hann bukkarnar aftur, við at reiggja hamaran yvir skinnunum og beinunum.



? glæsiliga · valkyrjunum · læknalistum

*Tórur í vogninum, 1865, eftir Ludwig Pietsch (1824-1911)*

Tá ið Tórur var á ferð á himmalhválvinum við vogni sínum, stóð eldur úr nasagluggunum á bukkunum, og neistar komu frá hógvunum. Vognurin helt nógvan gang. Um jatnir vóru at síggja, kastaði Tórur Mjølnir eftir teimum. So sóust snarljós, og toran gelti. Navnið tora kemur av Tóra.

Tórur verður umtalaður í mongum av Eddukvæðunum, t.d. í Hárbarðsljóðum, har hann reypar av avrikum sínum.

*Eg var á eysturleið,*
*bardist við jatnir,*
*illar gívrar*
*ið gingu á fjalli.*
*Fjølment hevði jatnaætt verið*
*um allir enn livdu,*
*so varð ongin*
*eftir í Miðgarði.*

**Visti tú**

at Mjølnir hevur lagt navn til flogbóltsfelag í Klaksvík.

*Froya hjá dvørgunum, eftir Louis Huard (1813-1874)*

## Siv

Kona Tór æt Siv. Navnið Siv merkir kona. Hon var tann vakrasta av øllum kvinnum og gudinnum.

## Froya

Froyur og Froya vóru systkin. Froya var kærleiksgudinnan. Hon var gift manni, ið nevndist Óður. Hann fór burtur á ferð, men kom ongantíð aftur. Eftir sat Froya og græt. Tár hennara vóru av reyðargulli. Hon var tiltikin vøkur. Hon hevði ein vogn, sum tvær kettur drógu. Froya var hjákona Óðins. Hon ráddi fyri kærleika og deyða.

## Froyur

Froyur var fruktbarisgudurin og gudur høvdinganna. Froyur átti skip, har pláss var fyri øllum ásunum. Skipið hevði altíð góðan byr og kundi sigla bæði á landi og sjógvi. Skipið kundi leggjast saman sum eitt turriklæði, tá ið tað ikki varð brúkt. Froyur hevði ein gølt, sum lýsti í myrkri og var skjótari enn nakar hestur.

*Froyur og Skímir breiða út fruktbari, 1882, eftir Carl Emil Doepler (1824-1905)*



? hjákøna · fruktbarisgudurin · góðan byr · gølt

## Týr

Týr var hin djarvasti av ásunum. Hann ráddi mest fyri sigrum í bardaga og var góður at heita á hjá reystmonnum. Týr hevði bara eina hond. Fenrisúlvurin beit hina av.

## Loki

Loki var vakur, men óndur og loyndarfullur. Hann dugdi gand og var altíð klárur at loypa split í. Hann átti børnini Hel, Fenrisúlvin og Miðgarðsormin.

## Hel

Hel var dóttir Loka og deyðsgudinna. Hon ráddi í Helheimi, ið lá undir jørð. Hagar fóru øll tey, ið doyðu av sjúku ella av elli. Teir, ið doyðu í bardaga, fóru til Valhallar, og har livdu teir ævigt hjá gudunum.

*Tjassi flýgur í arnarhami við Loka, 1906, eftir Lorenz Frølich (1820-1908)*

*Baldur raktur av eitraða pílinum, 1908, eftir George Wright (1872-1951)*

## Baldur

Tá ið jørðin skelvur, er tað tann revsing, Loki á sinni fekk, ið kemur til sjóndar. Loki var eitt illmenni, hann lokkaði tann blinda Hørð at drepa son Óðins, Baldur.

Gudarnir plagdu at stuttleika sær at skjóta til máls við pílum eftir Balduri. Alt livandi á fold hevði svorið ikki at skala Baldur, so uttan mun til hvussu hann varð raktur, hendi honum einki. Baldur var tann fittasti og best umtókti av øllum gudunum.

Loki toldi ikki, at øll stuttleikaðu sær og vóru í góðum lag. Hann royndi at finna onkran livandi lut, ið ikki hevði lovað at eira Balduri.

Loka eydnaðist at finna ein mistiltein, og úr honum gjørdi hann ein spískan píl, ið hann gav Hørði. Loki hjálpti Hørði at sikta og skjóta. Pílurin rakti Baldur og eftir henda dag var einki sum fyrr hjá gudunum. Teir saknaðu Baldur so sáran.

Loki varð revsaður. Hóast hann við gandi á ymsan hátt royndi at sleppa undan, so varð hann umsíðir fangaður og leinkjaður at einum kletti.

Uppi yvir Loka hekk ein eiturormur og dryppaði eitur á hann. Kona hansara Sigyn tókti synd í manninum og helt eini skál, ið eiturið dryppaði í. Men hvørja ferð skálin var full, mátti hon tøma hana, og tá var tað, at eitrið kom á Loka, og hann rykti og skrykti í leinkjurnar, so fjøllini ristust, og merktist hetta heilt til verð menniskjunnar.

## Verðsins endi

Óðin visti, at einaferð skuldi Ragnarøk verða. Ragnarøk var síðsti bardagin, har verðin skuldi ganga undir. Tá hevði Niðhøggur gnagað rótina á Yggdrasil av. Tá fór Yggdrasil at falla, himmal og jørð fóru at brenna upp, og brúgvin, ælabogin Bivrøst, fór at rapa.

Óðin visti, at tá ið lívsins træ fall, var tað tekin um, at jørðin skjótt fór at ganga undir í eldi og vatni. Tá ið Ragnarøkið kom, fór Fenrisúlvurin at gloypa Óðini, og Miðgarðsormurin skuldi drepa Tór.

Eftir hetta kom ein nýggj verð. Lívið byrjaði av nýggjum. Hvussu ofta hetta var hent, og hvussu ofta hetta fór at henda, visti eingin.

### Visti tú

Nøvnini á døgunum eru fornnorrøn.

*Sunnudagur* er dagur sólar.

*Mánadagur* er dagur mána.

*Týsdagur* er dagur Týrs.

*Mikudagur* ella *ónsdagur* er dagur Óðins.

*Hósdagur* ella *tórsdagur* er dagur Tórs.

*Fríggjadagur* er dagur Froyu.

*Leygardagur* kemur av orðinum laug, ið merkir bað. Eina ferð um vikuna var vaskidagur.

*Ragnarøk, 2003, eftir Anker Eli Petersen, f. 1959*



? svorið · skala · eira · mistiltein · rapa